# 2008 og umhvørvið



Val
NITA NÆS
javnaðarflokkurin

Vit brúka, kasta burtur – keypa nýtt og brúka – fyri síðan aftur at kasta tað burtur. Ein gamul kona, segði við meg nú ein dagin, at hon ikki kundi forgrípa, hvussu vit klára at keypa og brúka so nógv, sum vit fyrr ella seinni – tveitta burtur.

Hesi orð komu mær til hugs, nú eg eitt kvøldið sá eina sjónvarpssending, har tað varð upplýst at um 50 ár – er 30 % av heimsini skógi burturi og stórsta mangulvøra verður reint drekkivatn

Í somu sending varð ført farm, at um jørðin var eitt borð – ja, so ræður tað um í framtíðini at duga borðsið.

Henda sending fekk meg at hugsan um, hvat er tað, sum ger, at vit núlivandi vælferðar menniskju brúka so nógv og krevja so ótrúliga nógv matrialistiskt fyri at gerast lukkulig.

Vit búgva í einum sera vøkrum og friðarligum landi har dagligdagur okkara ikki er háttur av kríggi, hungri ella kúgan. Tey flestu av okkum hava minst 9 ella 10 ára skúlagongd og góðar møguleikar fyri miðnámsútbúgving og víðari útbúgving.

Samfelagshjólini mæla við nógvari ferð og arbeiði er til flest allar hendur. Vit eru eitt lítið land, sum burdi verið ein dreymur at umsita og ment. Og soleiðis kundi eg hildið áfram.

Hvussu hava vit so útviklað okkum? Nú vit hava so nógva skúlagongd í barlastini, eru uppald í sjálvari náttúruni og eru sloppin undan nógvum vandum, ið annars onnur fólkasløg uppliva.

Um vit hyggja eftir okkara lívsstíli, ja, so líkist hann tí veturevropeiska, tað er jú lívshátturin, sum megin parturin av heiminum roynir at ljósrita, við teirru grundgeving, at vit vilja hava útvikling.

Men hava vit gert okkum greitt, hvat útviklingur er? Og hvat slag av útviklingi vit vilja hava?

Flest vilja jú svara at um nógv nógv av peningi er í landinum, ja, so hava vit ein positivan útvikling.

Um vit aftur hugsa um jørðina sum eitt borð, hvussu vísa vit okkara borðsið?

Eru vit føroyingar serliga umhvørvisvinarlig??

Eru mong av okkum kedd um, at sjógfuglurin minkar?

At vit ikki vita meira um t.d. hvussu tað stendur til við okkara korallum?

Hvønn umhvørvispolitikk hava vit kláran, um vit finna olju?

Hvør tryggjar, at umhvørvið okkara verður umsitið á skilabestan hátt?

Og eru vit til reiðar at seta nógv nógvan pening av til at granska og verja umhvørvið.

Fyri stuttum staðfesti Føroya Løgting at Kyotosáttmálin eisini skal gjalda fyri Føroyar. Í hesum sáttmála hevur løgting okkara, vegna okkum borgarar, játtað, at vit veruliga skulu í gongd við at minka um útlatið av veðurlagsgassum. 10 ár eftir at Kyotosáttmálin sá dagsins ljós, hava vit føroyingar tikið við okkara parti av ábygdini og heimssamfelagið hevur fingið tíðindni.

Fyri framman liggur ein stór ábyrgd og ítøkiligar uppgávur, sum eiga at vísa á úrslit. Størstu ábyrgdina eigur Føroya Løgting, sum hevur samtykt at náa hesum máli og ein komandi samgonga, sum skal stinga út í kortið, hvussu vit kunnu røkka málinum.

Handla vit so út frá tí, sum vit samtykkja? Ongantíð fyrr hava vit havt so stórar byggiætlanir, sum bara vaksa og vaksa. Vit hoyra dagliga um mega projektir og útviklingurin - útviklast. Samstundist hava vit so gott sum ongan umhvørvispolitikk og almennir stovnar, sum vara av hesum øki - skríggja eftir størri játtanum, uttan at hetta verður gingið á møti.

Vit vita øll, at um alt livandi skal hava tað gott her á jørðini, so mugu vit til at broya hugburð, tá ið vit leggja okkara fíggjarvánir til rættis.

Vit verða í framtíðini noydd til at hugsa allan útvikling út frá einum umhvørvisverndarríkum sjónarhorni, tí gjøgnum tey seinasti 50 árini hava vit menniskju klárað at hótt okkara egnu jørð so nógv, at øll lond við virðing fyri sær sjálvum - noyðast at broyta og skifta kós. Um ikki, so er og verður útviklingurin sera óhugnaligur og altoyðandi.

Soleiðis sum eg síggja tað, so er týdningarmiklasti politiski samfelagsspurningurin í dag: Hvønn útvikling vilja vit sum samfelaga hava?

Vit verða noydd at taka henda spurningin í stórsta álvara.

Verði eg vald 19. januar, vil eg gera alt sum gerast kann, so at Javnaðarflokkurin og somuleiðis aðrir flokkar fara undir eitt seriøst politisk arbeiði, tá hugað verður um umhvørvið.

**Gott nýggjár øll somul!**

# Skrásett parlag?

KÁRI KJELNÆS



**Hvar standa flokkarnir sum flokkur, og ikki sum einstaklingar?**

Nú í løgtingsval stendur fyri framman tann 19. í hesum mánaðium, hevði tað veri gott fyri allar veljarar landsins at vita, - hvar politisku flokkarnir standa í hesum sera álvarsliga máli – tí tað er óv grunt og óverdugt fyri flokkarnar at siga, at hvør einstakur valdi politikkari stendur fríur í einum so týdningarmiklum máli.

Her mugu flokkarnir út úr brennandi tornarunninum – og tóna reint flagg - alt annað er eitt slag av bóndafangarí av veljaranum fyri at fáa atkvøður til at útinna nakað sum veljarin als ikki vil vera við til. Ein atkvøða til ein persón sum eg veit – ikki gongur inn fyri skrásettum parlagi – kann lættliga fara til ein annan persón, sum 100% gongur inn fyri skrásettum parlagi - tí persónurin sum eg valdi, kom akkurát ikki inn.

Júst tí eigur hvør einstakur politiskur flokkur at melda klárt út í hesum fyri land okkara so sera týðandi og álvarsliga máli.

Hoyrdi í útvarpinum í morgun, at forkvinnan í "Hugsa" (fólkaflokksungdómur) um eg hoyrdi rætt, segði fyri egna rokning, at tíðin er komin at skrásett parlag verður loyvt í Føroyum.

So her sæst týðiliga, at tann stóra skommin – 266B- sum Tjóðveldið bar niðan í løgtingið og bleiv samtykt, og sum nøkur tingfólk søgdu og mettu um, bert var byrjanin, var røtt.

Vanligi politikkarin heldur nok, at veljarin gloymir so skjótt, og tíverri er ikki einki í tí, men eg vænti ikki, at veljarin hevur gloymt nakað og nakran í hesum máli. Tað fer nok at vera eitt av høvuðsevnunum í valstríðnum, hvørjir flokkar og hvørjir persónar stóðu fyri hesari størstu skommini sum samtykt er á løgtingi, - sá á www.logting.fo hvørji tey vóru, so tað er lætt at fylgja við ídag.

Mær vitandi er tað bert ein flokkur (Miðflokkurin - sum flokkur og ikki einstaklingar) sum hevur TORAÐ at tónað reint flagg í hesum máli - hví tora hinir flokkarnir ikki at gera tað sama?

**Gott Nýggjár við ynskjum um eitt gott og etiskt val.**

# Skulu vit flenna ella/og gráta??

JÓGVAN E. ÓSÁ
josa@post.olivant.fo



Útvarpið visti at siga, at uppstilling til komandi løgtingsval er liðug – og vita tit hvat? Ja, tað vóru stór tíðindi.

Tað eru fleiri valevnir uppstillað uttan fyri miðstaðarøkið/Havnina – so kom ikki her og sig, at "vit" (Havnin) ikki hugsa um allar Føroyar – men letur nógv fleiri valevnir verða runt um í Føroyum enn í Havnini/mistaðarøkinum??

"Vit" hugsa um "tykkum". Ja, ja. Stikk denn.

Og tá ið "tit" ikki kunna finna útav at stilla "ordiliga" upp, ja, so mugu vit traðka til og "hjálpa" tykkum., við at stilla fleiri valevnir upp í "tykkara" økið. Ongin skal koma her og siga, at "vit" ikki hugsa um allar Føroyar.

Og "vit" lata okkum lumpa.

Nú er tað eisini blivi so galið, at onnur økir (Suðuroy/Norðoyar), "hjálpa" til, við at fara inn á økir hjá øðrum – so tey ikki koma frammum "okkara økið".

At fleiri valevnir eru uttanfyri Miðstaðarøkið, ger, at atkvøðurnar verða smærri býtt – og Miðstaðarøkið, ið hevur færri valevnir far gleðina av hesum – og tí "hjálpa" tey teim smærru økinum. Tí har eru fleiri atkvøður til færri valevnir.

Teir, ið vildu hava Føroyar til eitt valdømi, hava vunni – og tað við góðari hjálp frá "okkum" – uttanfyri Havnina.

Makan til dárskap skal man leita leingi eftir.

Havi áður sagt, at føroyingar eru býttir.

Passar ikki.

Teir eru pillbýttir!

**Gott nýggjár.**

# Skeltingin hjá Landsverki við Norðskálatunnilin og yvirhøvur

Í einum lesarabrævi í Sosialinum 18. desember 2007, vendir Magni Fles sær beinleiðis til Landsverk við eini viðmerking og fyrispurningi um skeltingina við Norðskálatunnilin. Hann metir seg vera villleiddan av teimum skeltum, sum í dag standa við Norðskálatunnilin.

Vit eru samd í og tilvitað um, at kunningarskeltini hjá Landsverki ikki hava verið nøktandi. Í eitt tíðarskeið hevur tí verið arbeitt miðvíst við at betra skeltingina yvirhøvur hjá stovninum, soleiðis at skeltingin verður greiðari, lætt lesiligari, meira standardiserað og eisini skillig hjá útlendingum í Føroyum.

Fyrstu skeltini av hesum slagi fara vónandi at síggjast beint eftir jól, og fara tey fyrstu at standa við Norðskálatunnilin. Eisini fara vit at síggja elektronisk kunningarskeltir á landsvegunum í nærmastu framtíð.

**Landsverk**

# Nøkur orð um heitið MÁLMØRK

ÁRNI DAHL



Av tí at hvørki útvarpið hjá Kringvarpinum ella Dimmalætting evnaðu at endurgeva heitið á nevndarálitinum hjá málstevnunevndini rætt, fari eg vinaliga at biðja um innivist fyri hesi stuttu frágreiðing:

Tað man ikki vera óvæntað, at málnevndarálit fáa heiti, ið spæla við orð. Álitið hjá svensku málnevndini eitur "Mål i mun", 2002, og "Sprog på spil" nevndi danska málnevndin sítt álit, sum kom í 2003.

Málstevnunevndin viðgjørdi nøkur uppskot til heiti og gjørdi av at nevna álitið "Málmørk". Her verður stutt greitt frá heitinum, og tá er tað vituliga seinni liður, sum hevur áhuga:

Sambært "Føroyskari orðabók" eru tvey orð, sum í eintali ella fleirtali skrivast mørk: hvørkikynsorðið eitt mark – fleiri mørk og kvennkynsorðið ein mørk – fleiri markir

Fyrra orðið mark – mørk (hv) hevur fimm týdningar:

**1** kennimerki
**2** skil ímillum øki
**3** tað at galda ella hava gildi
**4** endamál, markmið
**5** avmarking

Viðvíkjandi 1. týdningi er at siga, at hvør einstakur við máli sínum sigur okkurt um seg sjálvan, um hvaðan hann er (málføri), úr hvørjari samfelagsstætt (sosiolekt), um viðkomandi er ungur ella gamal, kvinna ella maður, útbúgvin ella ikki, o.s.fr.

2., 3. og 5. týdningur sipa til hetta at seta mørk, og tað gera vit í málsligum viðurskiftum: t.d. viðvíkjandi rættskriving, millum skriftmál og talumál, millum føroyskt og onnur mál.

Endiliga kann mørk eisini vísa til 4. týdning: endamál.

Seinna orðið mørk – markir (kv) hevur ein týdning: skógur.

Og í hann kunnu vit leggja so mangt: tað grør um gangandi fót, trøini myndandi orð, setningar ella orðavendingar o.s.fr.

**Við nýggjárskvøðu!**